## Stongdu tunnilin

**Týsmorgunin bar ikki til at koyra ígjøgnum Eysturoyartunnilin, tí eiðismenn skulu hava nýggjan grillvogn**

SAMFERÐSLA
*Jákup Mørk*

Norðoyingar og partur av eysturoyingum, sum týsmorgunin ætlaðu sær til Streymoynna, máttu ásanna, at hetta ikki lat seg gera við bili ella bussi.

Komin til Eysturoyartunnilin vórðu hesi nevnliga steðgað, tí tunnilin var stongdur. Tey ferðandi høvdu tískil ikki annað val, enn at seta kós inn á Toftir, har gamla Ternan mundi gera ársins túr, tá hon fullfermd við ferðafólki setti kós móti Havnini.

### Flutt grillbar

Tá vit týsmorgunin ringdu til Landsverkfrøðingin, fyri at fregnast um, hvør orsøkin til stongsulin var, vistu tey ikki at svara. Sagt varð, at nakað av arbeiði í løtuni verður gjørt inni í tunnlinum, men at teimum kunnugt hevði hetta ikki havt nakra ávirkan á ferðsluna. Annars verður sagt frá Landsverkfrøðinginum, at møguliga fer hetta arbeiði í onkrum av komandi vikunum at ávirka ferðsluna, tí tað møguliga verður neyðugt at steingja tunnilin onkra nátt.

Eftir at hava kannað málið, vórðu vit tó víst til løgregluna í Runavík. Har varð sagt, at tunnilin hevði verið stongdur, tí ein grillbar skuldi flytast úr Gøtu til Eiðis.

Tað var annars ikki bara at siga tað, at flyta grillvognin. Onkra staðni í tunnlinum vóru bert fáir sentimetrar at geva av, og alt í alt tók tað okkur um ein tíma at koma ígjøgnum tunnilin.

# Íløgan má gjaldast

**Við einari privatisering av farleiðum noyðist landið helst at rinda privatum avtakarum somikið av peningi, at hetta verður nóg mikið til rentur og avskrivingar**

PRIVATISERING
*Jákup Mørk*



*Verður ein tvíkilja keypt at røkja farleiðina millum Havnina og Skálafjørðin, fer hendan helst at kosta einar 10-12 mió.kr.*

Útvarp Føroya visti mánakvøldið at siga, at tað verða hampuliga stór krøv sett til ferjuna, sum framyvir skal reka Skálafjarðaleiðina, tá hendan verður privatiserað.

Í útbjóðingartilfarinum verður nevnt, at talan skal verða um eina ferju, sum skal taka umleið 100 ferðafólk, skal sigla eini 20 míl og at hon harafturat ikki skal vera eldri enn frá 1990.

### Helst ein tvíkilja

Alt hetta eru sjálvandi krøv, sum skulu tryggja eina so lætta og tryggja avgreiðslu av farleiðini sum gjørligt, men hetta fer helst eisini at merkja, at privatu avtakararnir av rutuni helst mugu fáa eitt munagott ískoyti til at reka farleiðina.

Sum er vísur roknskapurin hjá Strandferðsluni, at raksturin av Skálafjarðarleiðini gevur eitt hall upp á 3 mió.kr., og tá eru rentur og avdráttir ikki íroknaði. Hetta verður sjálvandi neyðugt, um eitt privat felag skal taka sær av leiðini.

Føroyskir skipsmeklarar, sum Sosialurin hevur verið í sambandi við, meta leysliga, at íløgan í eitt slíkt skip helst fer at liggja um einar 10-12 mió.kr. Tá verður roknað við, at talan verður um eina tvíkilju, og verður sagt, at útboðið av hesum slagi av ferjum hevur verið hampuliga stórt seinastu tíðina.

Sagt verður annars, at ein slík ferja helst kann fíggjast yvir eini 10 ár, og fer hetta uttan iva eisini at merkja tey tilboð, sum Strandferðslan fer at fáa um privatisering.

Verða avskrivingar ásettar í samsavar við áramálið, sum ferjan verður fíggja yvir, fer hetta saman við rentuútreiðslum at merkja eina útreiðslu hjá avtakaranum upp í uml. 1,5 mió.kr. um árið yvir eitt 10 ára skeið.

### Nakað fyri nakað

Akkurát hvussu stórt hallið verður í eini privatisering, er sjálvandi ilt at gita um. Sum nevnt gevur farleiðin í dag eitt árligt hall upp á 3 mió.kr., og saman við rentum og avskrivingum kann so helst roknast við, at landið í minsta lagi noyðist at rinda 4 mió.kr. um árið til ein møguligan privatan avtakara, ella 1 mió.kr. meira, enn farleiðin kostar í løtuni.

Hetta merkir tó ikki tað sama sum, at ein privatisering verður ein dýrari loysn fyri landið. Tað er jú soleiðis, at Strandferðslan við hesum sleppur undan at gera íløgur í nakað skip til hesa farleið, og harafturat kann hugsast, at nakað eisini kann sparast í umsitingini við einari privatisering.

# Havnagerð seinkar barnaansingini

**Í Klaksvík er kommunala fíggjarætlanin um at verða liðug, men tað tykist vera ein alstórur trupulleiki, at íløgukarmurin og –tørvurin ikki samsvara**

ÍLØGUR
*Jákup Mørk*



*Borgarstjórin í Klaksvík heldur tað vera óskiljandi, at málsøki verða flutt á kommunurnar, uttan at hesar samstundis hava møguleika at nýta fleiri pengar til hesi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sum borgarstjóri í Klaksvík er Steinbjørn Jacobsen í løtuni við at leggja seinastu hond á fyrstu fíggjarætlan sína. Nógvir smálutir eru sjálvandi í hesari, sum onkursvegna skulu ganga upp, men tyngsta takið er helst at fáa íløgukarmin hjá kommuni at røkka.

- Tað verður ógvuliga smábýtt við íløgunum hjá okkum í ár. Talan er um fleiri arbeiði, sum skulu gerast, men samlaði íløgukarmurin er einans 19 mió.kr., og tí er ikki gjørligt hjá okkum at fara í holt við nakað stórt arbeiði.

Borgarstjórin roknar annars við, at største íløgan komandi árini verður ger av eini nýggjari ídnaðarhavn, sum ætlandi skal gerast við Ánirnar.

- Tað er so avgjørt neyðugt hjá okkum at fáa hesa havnina gjørda. Inni á víkini sjálvari er plássið vorðið alt ov lítið, og vit eru faktiskt í dýrastu neyð. Við einum framtíðar undirsjóvartunnili til Klaksvíkar verður trýstið á havnina enn størri, og tí mugu vit fáa hetta arbeiðið gjørt sum skjótast, heldur borgarstjórin.

Víðari sigur hann, at hetta arbeiðið verður mett at kosta einar 30 mió.kr., ella tað sama, sum hálva aðru ferðina árliga íløgukarmin hjá kommununi.

### Royna at fáa meira

Skal hetta gerast í einum, sigur tað seg tí sjálvt, at allar aðrar kommunalar íløgur mugu leggjast til viks í eina tíð, og hesum er borgarstjórin sjálvandi lítið fyri.

- Mín vón er, at tað kann bera til, at fáa eina økta íløgujáttan til hetta arbeiðið. Kommunan er dag hampuliga væl fyri fíggjarliga. Skuldin, sum fyrst í nítiárunum var oman fyri fýra álíkningar, kemur við ársenda niður á eina álíkning, so fíggjarliga gerst hetta ikki nakað hóttafall fyri okkum.

- Harafturat fer eitt slíkt arbeiði ikki at ovurhita búskapin. Talan er í stóran mun um útreiðslur til maskinur og líknandi, og tí fer tað ikki at merkja eina stóra øking av lønarútgjaldingunum. Tí vóna vit, at hetta fer at bera til, sigur Steinbjørn Jacobsen, sum annars heldur, at íløgukarmurin hjá kommununum er alt ov lítil.

### Barnaansingin restar

Hann vísir á, at eru nógvar íløgur í kommununi, sum framvegis liggja á láni eftir kreppuna. Eitt nú eru bæði skúlin og svimjihøllin partar av eini langtíðar íløguætlan hjá kommununi, og sum er, ber illa til at seta meira ferð á hetta arbeiði.

- Tað tyngsta haldi eg tó vera, at vit ikki fáa gjørt nakað munagott á barnaansingarøkinum. Vit hava eitt byggibúgvið økið tøkt, men við tronga íløgukarminum hava vit ikki møguleika at byggja ein stovn í løtuni. At loysa hetta við leigumálum ger so avgjørt ikki loysnina bíligari, og heldur ikki er ráðiligt at keypa onkur eldri hús, fyri at gera tey um til ansingarstovn.

- Tað løgna við hesum er eisini, at økið er lagt út til kommunurnar at umsita, men hóast vit við hesum hava átikið okkum fleiri skyldur, so hava vit ikki fingið møguleika at nýta meira pening til økið. Tað hongur als ikki saman í mínari verð.

- Hetta er ein ovurhonds stórur trupulleiki hjá okkum. Bíðilistin telur í løtuni 150 børn, og skulu fólk støðast hjá okkum, er neyðugt at loysa hendan, men við verandi karmi gerst einki í løtuni, sigur borgarstjórin í næst størsta býnum at enda.



# Skjóta upp at umskipa ferðavinnupolitikkin

**Á fundi í Ilulissat í Grønlandi í seinastu viku, varð skotið upp at umskipa ferðavinnupolitikkin í útnorði. Ætlanin er at fáa einfaldari bygnað í vinnuna**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*



*Grønlendski ferðavinnustjórin, Stig Rømer Winther, í miðjuni, skýtur upp broytingar í bygnaðinum í útnorður ferðavinnusamstarvinum. Myndin er tikin á pressufundi í Ilulissat, har eisini íslendski feðravinnustjórin, Magnús Oddson, v.m. og føroyski ferðavinnustjórin, Heri Niclasen, h.m. luttóku*

*Mynd: Edvard Joensen*

Verða ferðaráðini og teir stovnarnir, sum umsita pengarnar í ferðavinnuni í Útnorði lagdir saman, verður tað nógv einfaldari og lættari at reka ferðavinnu í økinum, sigur Stig Rømer Winther, stjórí grønlendska ferðaráðnum og formaður í Vestnorden Travel Board, sum er samtak av grønlendska, íslendska og føroyska ferðaráðnum.

– Grønland hevur nógv at bjóða ferðafólki, men vit hava ikki nóg mikið av pengum til at gera tað, vit fegin vilja innan ferðavinnuna, sigur Stig Rømer Winther. Pengarnir liggja aðrastaðni enn hjá ferðaráðnum,

Og rætt hevur grønlendski ferðavinnustjórin, er lætt at sanna, tá ein stendur á svalanum á Hotel Arctic beint uttan fyri sjálvan Ilulissat bý og hyggur yvir á havnina og býin.

Ferðslan er nógv inn og út úr havnini. Smáar jollur ferðast alla tíðina aftur og fram. Størri skip koma og fara. Fiskiskip og ferðamannaskip. Og handan nesi fyri eystan liggja risastóru ísfjøllini, sum steðgað eru á eina løtu á veg út úr Ísfjørðinum, har jøkulin hevur kálvað tey og sent tey seinasta strekkið til havs á teirra kanska 100.000 ára longu ferð.

### Samanlegging

Umframt tey trý ferðaráðini í Útnorði eru eisini aðrir felagsskapir, sum gera seg galdandi innan eitt nú ferðavinnu. Tað eru felgsskapir, sum á fíggjarlógunum hjá teimum ymsu londunum fáa pening avsettan, sum so aftur verður latin fólki, sum eftir umsókn ætlar undir eitthvørt tiltak í økinum. Ofta er talan um mentanarlig tiltøk, og mangan slíkt, sum hevur við sær ferðing millum londini.

Høvdu vit kunnað fingið lagt hesar felagsskapir saman við ferðaráðunum í teimum trimum útnorðurlondunum, hevði tað merkt, at vit høvdu einar tvær milliónir krónur eyka at ment ferðavinnuna við, sigur Stig Rømer Winther, stjóri í grønlendska ferðaráðnum.

Hann sigur, at tað eru millum annað um felagsskapirnir Samik og Fitur, hann hugsar um í hesum førinum.

Samik er felagsskapur, sum Ísland og Grønland í felag standa fyri, meðan Fitur er samstarv millum Ísland og Føroyar, greiðir hann frá.

Á fundi í Ilulissat, har millum onnur eisini landsstýrismenninir við ferðavinnu, Simon Olsen úr Grønlandi og Bjarni Djurholm úr Føroyum, vóru hjástaddir, skeyt Stig Rømer Winther upp, at gera hesa samanleggingina. Hann mælti til at feðraráðini og hesir báðir felagsskapirnir, Samik og Fitur, verða løgd saman í ein felagsskap.

Tað hevur fleiri fyrimunir við sær, sigur hann. Eitt nú verður bara ein stjórn, sum ferðast minni enn tríggjar. Bara har eru pengar at spara, sigur Stig Rømer Winther.

Og tað verður eisini nógv lættari at yvirskoða, hvørji tiltøk verða stuðla, tá alt er á sama borði, vísir hann á.

Hann sigur, at uppskotið varð positivt móttikið av føroyingum. Bæði stjórin í Ferðaráðnum, Heri Niclasen, og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tóktust vera fyri tí, meðan íslendingar ikki tóku undir við tí, sigur grønlendski ferðavinnustjórin.

### Bryggen og Hetland

Eisini onnur nýhugsan hevur verið frammi á ferðavinnustevnuni Vestnorden Travel Mart í Ilulissat. Eitt nú at leggja eina messu í København og at byggja samstarvið út til eisini at umfata hetlendsku ferðavinnuna.

Skotið er upp, sigur Stig Rømer Winther, at leggja ferðavinnustevnuna í København í 2003. Uppskotið er komið úr Føroyum, sigur hann.

Hetta er sama ár, sum Norðuratlantiska Bryggjan, sum felagstiltakið har verður nevnt, letur upp. Ætlanin er ikki at hava stevnurnar permanent í København, men bara royna tað hesa einu ferðina fyri fyrst.

Tað kann hava nógvar fyrimunir við sær, væntar grønlendski ferðavinnustjórin, sum fær undirtøku frá fleiri teirra, sum luttøku á stevnuni í Ilulissat. Teir vísa á, at tað eigur at fara at verða lættari at fáa fólk á messuna, tí hon tá liggur nógv nærri til vanliga kundanum, sum fyri stóran part er europeari.

Men tað er ikki bara undirtøka fyri hesum, sigur Stig Rømer Winther, hóast bæði føroyski og grønlenski ferðavinnustjórin taka undir við tí. So her man tíðin fara at vísa, hvussu leikur fer.

Sjálvur sær hann stórar fyrimunir í at hava eina felags skrivstovu í Keypmannahavn, har londini kundu stuðla hvørjum øðrum á mangan hátt, hóast fíggingin varð hildin hvør sær.

Men ikki er líkt til, at hann fær undirtøku fyri hesum, væntar hann, tí hvørki føroyingar ella íslendingar tykjast hava tann øgiliga stóra áhugan fyri hesum.

Eisini varð havt frammi at fara undir neyvari samstarv við Hetlendsku ferðavinnuna og møguliga fáa Hetland upp í útnorðursamstarvið.

Eisini hetta er mál, sum komið er úr Føroyum og sum fer at gagna føroysku ferðavinnuni mest, um tað verður til nakað.

Íslendingar fáa kanska eitt sindur burtur av, meðan tað als ikki kemur at ávirka grønlendsku ferðavinnuna, sigur grønlendski ferðavinnustjórin, sum tó leggur dent á, at hann stuðlar uppskotinum og fegin tekur undir við, at hetlendigar eisini koma upp í samstarvið.



*Veldugu ísfjøllini, ið eru sum heilar oyggjar til støddar, hugtaka ferðamannin, sum kemur til Grønlands*

*Mynd: Edvard Joensen*